Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 29.04.2019 kl. 20:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Fríðgerð Heinesen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerð:** | | | |
| 30/19 | 19/00039-3 | Veganavn til kaiøkið undir Gøtueiði | 3 |
| 31/19 | 19/00197-1 | Mál 19/00197 - Karmar um savn og verkstað fyri samtíðarlist | 4 |
| 32/19 | 19/00253-2 | Tilmæli til mál 19/00253 - Eykajáttan mars 2019 | 6 |
| 33/19 | 19/00311-1 | Tilmæli - Viðgerð av tilboðum til dagføring av bátahylinum í Norðragøtu | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34/19 | 19/00323-2 | Tilmæli - Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 347s í Leirvík | 10 |
| 35/19 | 19/00348-1 | Veganavn til vinnustykkið í Gøtudali | 12 |
| 36/19 | 19/00336-1 | Ársroknskapur fyri 2018 | 13 |
| | | | |

## 30/19 Veganavn til kaiøkið undir Gøtueiði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.04.2019 | 30/19 | 19/00039-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Navnanevndin mælir til at vegurin eitur “við Klovnastein”. Hetta við teirri grundgeving, at Klovnasteinur liggur í økinum.<br>Navnanevndin mælir sostatt eisini til, at bátahylurin eitur “Bátahylurin við Klovnastein”. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Sí tilmæli frá navnanevndini |

**Viðtøka Býráðið 29. april 2019**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 31/19 Mál 19/00197 - Karmar um savn og verkstað fyri samtíðarlist

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | | | 19/00197-1 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.04.2019 | 40/19 | 19/00197-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.04.2019 | 29/19 | 19/00197-1 |
| 4 Býráðið | 29.04.2019 | 31/19 | 19/00197-1 |

**Málslýsing:**

Tá tað kemur til karmar um søvn og verkstað fyri samtíðarlist er tað lítið at ivast í, at hetta øki ikki hevur hægstu raðfesting í Føroyum. Hetta er eitt økið sum Eysturkommuna kann arbeiða víðari við, t.d. sum ein "nicha" sum hinar kommunurnar ikki hava. Tað fyrsta vit kunnu gera er at kanna hvørjir fysiskir karmar Eysturkommuna kann bjóða á økinum.

---------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------

**11. januar 2018:**

Mentanarnevndin mælti í 2016 til, at húsið á mtr.nr.28e í Norðragøtu verður karmur um savn og verkstað fyri samtíðarlist í Gøtu. Harumframt mælti Mentanarnevndin til, at húsið verður varðveitt og at ein arbeiðsbólkur verður settur at kanna, hvat kann gerast fyri at seta húsið í stand til uppruna líki.

Í 2018 er 200.000 kr. settar av undir mentanarpolitikkinum (rakstur) til húsið, so verkætlan kann fara ígongd.

**4. apríl 2019**

Arbeiðsbólkurin hevur latið inn upplegg um verkætlan við húsið á matr. 28e í Norðragøtu.

Í stuttum skulu 1. og 2. hædd brúkast til listafólkabústað. Opið skal í fyrstu atløgu verða fyri so fjøllbroyttum listafólki sum gjørligt. Pláss skal eisini verða fyri altjóða listafólki, so húsið skal m.a. knýtast at altjóða felagsskapinum NIFCA.

Kjallarahæddin, sum er sjálvt húsið, hoyggjhúsið og verkstaðurin, skal verða tann almenni parturin, har m.a. 30-40 fólk kunnu koma inn til tiltøk. Harumframt skal hesin parturin eisini brúkast til listaverkstað.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

300.000 kr. eru settar av til verkætlanina í 2019. Húsini er ruddaði og óbrúkiligt tilfar er burturbeint 30.000 til brúkt til tað endamálið.

**Tilmæli**

Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

--------------------------------------------------------------------------------

11. januar 2018: mælt verður til at leggja lunnar undir at velja arbeiðsbólk, sum skal koma við tilmæli um, hvat skal gerast við húsið á mtr.nr.28e í Norðragøtu.

**4. apríl 2019**

Mælt verður til at taka undir við arbeiðsbólkinum um at húsið skal brúkast til listafólkabústað, framsýningarhøli og listaverkstað.

Harumframt verður mælt til, at fyrstu stigini til at fáa húsið nýtilig, er at fáa hita í húsið, skifta takið og fáa vatn inn í húsið.

**Viðtøka Mentanarnevndin 08. april 2019**
Mentanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Viðtøka Býráðið 29. april 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 32/19 Tilmæli til mál 19/00253 - Eykajáttan mars 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.04.2019 | 30/19 | 19/00253-2 |
| 2 Býráðið | 25.03.2019 | 25/19 | 19/00253-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 21.03.2019 | 27/19 | 19/00253-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | | | 19/00253-2 |
| 5 Býráðið | 29.04.2019 | 32/19 | 19/00253-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. yvirlit yvir íløgur fyri mars 2019.<br><br>Íalt eru eykajáttaninar á 8.920.000,00 harav 550 t.kr. eru til rakstur og restin er íløgur. Talan er fyri tað mest um játtanir sum vóru givnar í fjør og har arbeiðið er byrja ella umbiðið. Men nakrar av eykajáttanunum eru ikki játtaðar fyrr, men vóru avtalaðar í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2019. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaðu íløgurnar hækkað við 8.370.000,00 kr. og rakstrarútreiðslurnar hækkað við 550 t.kr. Av tí at tað fyri tað mesta eru íløgur sum verða fluttar frá 2018 til 2019 hevur hetta ikki stórvegis ávirkan á gjaldføri hjá kommununi í mun til framskrivingarnar fyri fíggjarætlanina fyri 2019, men RLÚ vil sjálvandi minkað samsvarandi eykajáttanunum. Gjaldføri hjá kommununi er gott og eykajáttaninar kunnu tískil takast av innistandandi.<br><br>**Ískoytin 15. Apríl 2019**<br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita eykajáttanir sum víst í hjál. yvirliti t.e 8.370.000,00 kr. til íløgur og 550 t.kr. til rakstur |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 21. marts 2019**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Viðtøka Býráðið 25. marts 2019**
Samtykt taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiasen, Gudny Langgaard, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Fríðgerð Heinesen, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Per Martin Gregersen.

**Atkvøður ímóti:**
Tollakur Joensen

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og við 1. viðgerð.

**<u>Viðtøka Býráðið 29. april 2019</u>**
Samtykt eins og við 1. viðgerð.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Uni Rasmussen Hjalti Dalheim, Fríðgerð Heinesen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hans Mourits Foldbo, Brandur Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

## 33/19 Tilmæli - Viðgerð av tilboðum til dagføring av bátahylinum í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 08.04.2019 | 18/19 | 19/00311-1 |
| 2 Vinnunevndin | | | 19/00311-1 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.04.2019 | 16/19 | 19/00311-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.04.2019 | 32/19 | 19/00311-1 |
| 5 Býráðið | 29.04.2019 | 33/19 | 19/00311-1 |

**Málslýsing:**

Týsdag 26 mar 2019 var lisitatión av Bátahylinum í Norðragøtu, 8 fyritøkur vóru bjóðaðar við og vit fingu tvey tilboð inn.
JK Petersen hevði lægsta tilboð.

Umsitingin hevur saman við Teknistovuni gjørt eina meting av hvat kemur afturat handverkaraútreiðslum.

Tað, sum kemur afturat tilboðnum í byggiharraveitingum er:

- Óvæntaðar útreiðslur.
- Eftirlit og byggileiðslu
- Flyta pumpuna, sum pumpar vatn inn til Fiskavirkið.

Tað vil siga at samlaða metingin fyri verkætlanina er **15.767.914 kr.**

Upprunaliga kostnaðarmetingin tann 19. november 2019 var kr**. 8.383.337,50 við kommunu mvg**.Hetta var fyri handverkaraútreiðslur og projektering.

Tann 23. November var nýggj kostnaðarmeting gjørd á Kr. **9.752.287,00** við kommunu mvg. Her vóru umframt handverkaraútreiðslur og projektering, eisini óvæntaðar útreiðslur, eftirlit og byggileiðsla.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Arbeiðið er mett at kosta 15.767.914 kr. u/mvg.
5 mió. eru settar av til endamálið á fíggjarætlanini í 2019.

**Tilmæli**

Mælt verður til at fara í samráðing við JK Petersen um verkætlanina.

**Viðtøka Vinnunevndin 08. april 2019**

Fríðgerð Heinesen mælir til at arbeiðið ikki verður gjørt nú, men útsett 1-2 ár, tí at tilboðið er langt omanfyri kostnaðarmetingina og fíggjarætlanina.
Hjalti Dalheim tekur støðu til málið á fíggarnevndarfundi

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 12. april 2019**
Tollakur Joensen og Uni Rasmussen mæla til at fara í samráðingar við JK Petersen um verkætlanina.
Árni Jacobsen mælir til at bjóða verkætlanina út aftur um nøkur ár.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2019**
Hjalti Dalheim mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í byggi- og býarskipanarnevndini. Gudny Langgaard og Jóhan Christiansen taka støðu á býráðsfundinum

**Viðtøka Býráðið 29. april 2019**
Málið tikið at skrá.

## 34/19 Tilmæli - Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 347s í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.04.2019 | 17/19 | 19/00323-2 |
| 2 Býráðið | 29.04.2019 | 34/19 | 19/00323-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um marknaumskipan á matr. nr. 347s í Leirvík.

Í umsóknini stendur, at Kommunan í síni tíð (90´ inum) hevur staðsett garasjuna eftir skeivum punkti.
Tað merkir at eigarin av matr. nr. 347s ikki eigur øki, sum bilurin stendur á (sí viðheft umsókn).

Økið frammanfyri garasjuni er kommunalur vegur og um markið skal flytast, kann tað í framtíðini koma at ávirka innkoyringina hjá grannanum.
Tí kann tað verða óheppið at flyta markið.

**Ískoyti 12.04.2019**
Málið verður tikið upp aftur til viðgerðar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir frá at ganga umsóknini um marknaumskipan á matr. nr. 347s í Leirvík á møti.
Ístaðin kann Eysturkommuna geva umsøkjara loyvi at brúka økið frammanfyri garasjuni, sum parkering til bilin.

**Ískoyti 12.04.2019**
Mælt verður til at tinglýsa ein servitutt á økið frammanfyri bilhúsinum á matr. nr. 347s í Leirvík, har tað stendur at ánarin av matr. nr. 347s í Leirvík, hevur rætt at stilla bil á stykkið.
Eisini skal standa:

- at órudd og líknandi ikki skal stillast á tinglýsta økið.
- At byggjast kann ikki á tinglýsta økið.

### Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 12. april 2019
Uni Rasmussen og Tollakur Joensen taka støðu á býráðsfundi.
Árni Jacobsen tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, sum er dagfest 12.04.2019.

### Viðtøka Býráðið 29. april 2019
Einmælt samtykt ikki at ganga umsóknini um marknaumskipan á matr. nr. 347s í Leirvík á møti.

## 35/19 Veganavn til vinnustykkið í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.04.2019 | 35/19 | 19/00348-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Navnanevndin mælir til at vegurin inni á vinnustykkinum eitur “við Leitisstein”, og fer vinnustykkið sostatt at eita “Vinnustykkið við Leitisstein”.<br>Navnanevndin mælir til, at vegurin, ið er javnfjarur við Fuglafjarðarveg, frá rundkoyringini og inn í dalin, eitur “Dalsvegur”. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Sí tilmæli frá navnanevndini |

**Viðtøka Býráðið 29. april 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 36/19 Ársroknskapur fyri 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | | | 19/00336-1 |
| 2 Býráðið | | | 19/00336-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.04.2019 | 34/19 | 19/00336-1 |
| 4 Býráðið | | | 19/00336-1 |
| 5 Býráðið | 29.04.2019 | 36/19 | 19/00336-1 |

**Málslýsing:**

Roknskapurin fyri 2018 hevur hesi høvuðstøl í mió. kr.:

| | |
|---|---|
| Inntøkur: | 117,5 |
| Rakstrarútreiðslur: | 84,4 |
| Rentuútreiðslur: | 0,9 |
| Útreiðslur til rentustuðul: | 1,3 |
| **Úrslit eftir rentir:** | **30,9** |
| Løgur: | 43,5 |
| **RLÚ:** | **-12,6** |

Í 2018 varð goldið 5,1 mió. kr. í avdráttum. Eysturkommuna hevur onga nettoskuld, men eina nettoogn á 1,6 mió. kr. við árslok 2018.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. april 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap

**Viðtøka Býráðið 29. april 2019**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

fundurin lokin kl. 22.30

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Fríðgerð Heinesen